**Magnus Heinason – Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar á Føroyabanka. Túrur nr. 2008**
**Tíðarskeið 18/03-25/03-2020**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Marit Pedersen, Jens Arni Thomassen, Durita Sørensen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund (kanningarleiðari).

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndum sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa, longu og brosmu.

**Aðrar uppgávur:** Nakrir DNA-prøvar vórðu tiknir av toski. Hæddin á høvðulínuni varð skrásett elektroniskt.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinsham lemmar. Breitlar 60 m og 120. Seabird CTD við rosettu, sum tó ikki riggaði. Miniloggarar at skráseta sjóvarhita.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini mikukvøldið kl 21:00. Vit byrjaðu at taka støðir hósmorgunin og tóku støðir á tí grunna partinum á Føroyabanka. Vit lógu bakk leygardagin og endaðu túrin á Føroyabanka sunnudagin, tí veðurforsøgnin segði nógvan vind. Tilsamans vórðu 17 fiskistøðir tiknar og eingin CTD-støð, tí hon virkaði ikki, tó varð ein glúpprøvi tikin. Harvið lógu 12 fiskistøðir eftir, flestu á djúpum vatni. Vit lógu bakk mánadagin. Týsdagin tóku vit onkrar írestandi støðir, sum lógu eftir frá túri 2006 og skrásettar undir túri 2009. Vit vóru á Havnini týskvøldið kl. 23:00 og landaðu fyrrapartin mikudagin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu og nytrur (Talva 1) er víst niðanfyri. Talið av nytrum var eftir ætlan fyri hýsu, og 193 nytrur vórðu tiknar av toski.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 22. mars. Ynskiligt er, at nytrunar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 30. juni.

**Fyribilsúrslit:** Á yvirlitstrolingini í september 2019 vóru ábendingar um, at toskurin var við at koma fyri seg aftur á Føroyabanka og gav verandi túrur í mars 2020 somu ábending. Tað var nógv at fáa av toski á Føroyabanka og líktist hetta árunum frá 1996 til 2003 (Talva 1, Mynd 1). Hetta var toskur í øllum støddum. Eins og í fjør var sera nógv at fáa av hýsu (Mynd 2) og har var nógv smáhýsa ímillum. Nøgdin av upsa, longu, havtasku og tungu hevur verið ójøvn ár um annað uttan nakra øking ella minking (Mynd 3, 4, 5, 6). Nøgdin av glýsufiski er minkað, meðan nøgdin av hvítingsbróðri er økt nógv (Mynd 7, 8). Verandi úrslit eru gjørd upp fyri tann grunna partin av Føroyabanka við tað, at bert tvær djúpar støðir vórðu tiknar í mars í ár. Magakanningar vístu, at tað var nógv til av nebbasild.

**Talva 1:** Veiða, nytrur og magar tikin á túri 2008, yvirlitstroling á Føroyabanka í mars 2020. Í ár vóru bert tvær djúpar støðir tiknar og tí lítið veitt av m.a. havmús, gulllaksi, silvurmurti, longu, brosmu, kongafiski og gulllaksi.

| FISKASLAG | KG í 17 hálum | Nytrur | Magar | KG í 15 hálum í fjør | Lutfall kg per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| TOSKUR | 12166,396 | 193 | 56 | 1466,890 | 7,32 |
| HÝSA | 18428,517 | 345 | 85 | 18064,093 | 0,90 |
| BROSMA | 1,875 | 1 | | 0 | |
| LONGA | 463,899 | 26 | 1 | 150,900 | 2,71 |
| UPSI | 215,585 | 47 | 26 | 296,385 | 0,64 |
| HVÍTINGUR | 282,962 | 1 | 1 | 144,657 | 1,73 |
| HVÍTINGSBRÓDIR | 476,645 | | | 60,343 | 6,97 |
| SVARTKJAFTUR | 1,954 | | | 0 | |
| TUNGA | 7,990 | | | 16,214 | 0,43 |
| NEBBASILD | 0,791 | | | 0 | |
| HUMMARI | 0,144 | | | 0 | |
| SKØTA(BATIS) | 12,650 | | | 24,620 | 0,45 |
| HAVTASKA | 104,605 | | 6 | 42,965 | 2,15 |
| LOLIGO | 125,561 | | | 109,717 | 1,01 |
| GULLLAKSUR | 11,679 | | | 0 | |
| S. VIVIPARUS | 53,695 | | | 72,511 | 0,65 |
| SILVURMURTUR | 0,310 | | | 0 | |
| SANDSKØTA | 8,305 | | | 0 | |
| NEBBASKØTA | 3,545 | | | 0 | |
| HAVMÚS | 332,565 | | | 0 | |
| STREYMSILD | 3,646 | | | 0 | |
| GLÝSUFISKUR | 51,749 | | | 57,161 | 0,80 |
| LÝRUR | 8,545 | | | 0 | |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 1,503 | | | 0,145 | 9,15 |
| KNURRHANI | 10,299 | | | 19,581 | 0,46 |
| REYDI KNURRHANI | 5,274 | | | 6,475 | 0,72 |
| HVALSPÝGGJ | 15,525 | | | 0 | |
| GAMAL FISKUR | 21,016 | | | 1,703 | 10,89 |
| PORIFERA(SVAMPUR) | 0,734 | | | 0 | |
| ACTINIARIA(SJÓNOTA) | 4,758 | | | 0 | |
| BLETTUTA SKØTA | 6,190 | | | 12,760 | 0,43 |
| ECHINIDAE(IGULKER) | 6,870 | | | 0,394 | 15,39 |
| PURPURIGULKER | 2,919 | | | 0 | |
| ASTERIIDAE (KROSSFISKUR) | 7,468 | | | 0 | |
| TILSAMANS | 32846.169 | 613 | 175 | | |




Mynd 1. Nøgd av toski per hál (= troltíma) á Føroyabanka í mars grynri enn 200 m.




Mynd 2. Nøgd av hýsu per hál (= troltíma) á Føroyabanka í mars grynri enn 200 m.




Mynd 3. Nøgd av upsa per hál (= troltíma) á Føroyabanka í mars grynri enn 200 m.




Mynd 4. Nøgd av longu per hál (= troltíma) á Føroyabanka í mars grynri enn 200 m.




Mynd 5. Nøgd av havtasku per hál (= troltíma) á Føroyabanka í mars grynri enn 200 m.




Mynd 6. Nøgd av tungu per hál (= troltíma) á Føroyabanka í mars grynri enn 200 m.




Mynd 7. Nøgd av glýsufiski per hál (= troltíma) á Føroyabanka í mars grynri enn 200 m.




Mynd 8. Nøgd av hvítingsbróðri per hál (= troltíma) á Føroyabanka í mars grynri enn 200 m.

Havstovan, 24/3-2020,

Petur Steingrund